TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Grundskeið Relæstýring

Treytað av nóg stórari undirtøku, verður skeið hildið í **døgunum 30/9 - 4/10 - 2002**

**Skeiðið er ættlað fyri fólk, sum arbeiðar við relæer innan fyri elfagið, maskinmenn og kølimontørar og onnur, sum hava áhuga í relæstýring**

Endamál: **At geva luttakarunum grundleggjandi vitan relæer virkemåde, anvendelse og fejlfinding, diagramlæsning og nøgleskema og afprøvning**

Kostnaður: 3.950,- kr.

Skeiðleiðari: Lærari Charles Friðberg

Tilmelding: **áðrenn 23. september 2002**

**Handverkarar kunnu søkja stuðul eftir reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum.**

**Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin "VITAN", kunnu søkja um stuðul haðani.**

Umsóknarbløð til Undirvísingar- og Mentamálaráðið og Vitan fáast á skúlanum.

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf 318813 (mánadag - fríggjadag, kl. 8-12 & 13-16)

# Frá Fuglafjarðar Sjónleikarafelag

Aðalfundur verður í mentanarhúsinum mikukvøldið 25. september kl. 20.00.

**Fundarskrá:**
1. Lógarbroyting fyri Fuglafjarðar Sjónleikarafelag
2. Reglugerð fyri Eysturoyar mentanarhús.

Møtið fjølment.

**Fuglafjarðar sjónleikarafelag**

# Tilboð ynskist

uppá at stoypa nýggja rætt fyri Ytra part í Skálafjalli. Tilfar fæst við at venda sær til Jóan Petur Hansen, 44 15 75, best eftir kl. 17.00. Tilboðini skulu sendast til, Hagastýrið fyri Ytra part í Skálafjalli v/ Jóan Petur Hansen, 485 Skálafjørður.

**Hagastýrið**

# Lýsing um studning til stráfóður

Studningur til stráfóður verður veittur við heimild í fíggjarløgtingslógini fyri 2002.

Umsøkjari skal:

1. vera bókhaldsskyldigur sambært § 1B, pkt. 27 í løgtingslóg nr. 75 frá 24. okt. 1978.
2. vera meirvirðisgjaldsskrásettur sambært løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 við seinni broytingum.
3. hava latið minst 5000 kg av mjólk í farna ári og/ella
4. hava latið minst 4 tarvaslakt eldri enn 15 mánaðar og/ella minst 4 kvígur. Undantiknir hesum treytunum í pkt. 4 eru framleiðarar í: Mykinesi, Gásadali, Koltri, Skúvoy, Dímun og Fugloy.

Umsóknarbløð verða send teimum, ið fingu stráfóðurstudning í 2001.
Onnur fáa umsóknarblað við at ringja til Føroya Jarðarráð, tlf. 31 11 80 í seinasta lagi 20.9.2002.

FØROYA JARÐARRÁÐ
Postrúm 50 · R. C. Effersøesgøta 4 · FO-110 Tórshavn
tlf. 311180 · fax 311185 · teldupostur: fj@fj.fo

# Advokatskrivaranæmingur

Søkt verður eftir advokatskrivaranæmingi at byrja 1. oktober 2002. Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum verður at senda til Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøtu 9, Postboks 6, 110 Tórshavn.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja 31 11 45 og spyrja eftir Óla Jákup Kristoffersen, e-mail ojk@advlaw.fo ella Heidi Hammer, e-mail: hjh@advlaw.fo

**Advokatskrivstovan**
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145
att.: Óla Jákup ella Heidi

# Ríðiskeið

Skipað verður fyri ríðiskeiðum í reiðhøllini hjá Berghestum í Marknagili í heyst.

Skeiðleiðari: Nina.
Avmarkað atgongd.

Ring og hoyr nærri.

**Berghestar**
Tlf. 316896

SJÓVAR KOMMUNA

# Tekniskur leiðari

Søkt verður eftir tekniskum leiðara til Sjóvar kommunu.

Viðkomandi skal umsita dagligu teknisku umsitingina í tøttum samarbeiði við arbeiðsfólkini hjá kommununi.

Fyrimunur er, um umsøkjari er handverkari, hevur teldukunnleika og praktiskar royndir.

Umsóknir verða at senda til Sjóvar kommunu innan 17. sept. 2002.

**Sjóvar kommuna**
490 Strendur
Tlf. 447158
e-mail: sjk@kallnet.fo



zarepta

# Frá Zarepta

**Kvinnustevna** verður í døgunum 20.09.–22.09.

Tekning á tlf. 286140 ella 332140 og fax nr. 333141.

*Latið okkum geva gætur hvør eftir øðrum, so vit fáa hvør annan at brenna í kærleika og góðum verkum.*
Hebr. 10,24


Viðgerðarstovan



Erna S. Hákonardóttir
Alkohol- og Familjuráðgevi

Faklig ráðgeving · »Opin viðgerð« Einstaklingar · bólkar · skeið.

Ringið og fái nærri at vita.
Tlf. 22 28 45

Vit fara um alt landið

Tórshavnar Lásaservice
v/John Petersen

- Umskipan
- Uppseting
- Systemir
- Umvælingar
- Lyklar

Tlf. 310 411 · Fartlf. 215 411





Vit umboða...

Perkins motorar



Ringið og hoyrið meiri um vælumtóktu motorarnar!

AWI-Boats Service
Tlf: 44 85 85 · Fax: 44 87 85

LANDSINS BESTU PRÍSIR !!!

MULTIMEDIA TELDUR

FUJITSU SIEMENS COMPUTERS

SCALEO P4 1.7 GHz
- Intel Pentium 4 1.7 GHz
- 256 MB DDR-RAM
- 40 GB Harddisk
- GeForce4 64MB DDR TV-OUT
- DVD & CDRW
- AC97 Ljóðkort
- 120W Hátalarar
- 10/100 Netkort
- 56k Modem
- FireWire
- Tastatur & Wheel Mús
- WebCam Express
- 19" Monitor
- Nógv forrit og spøl fylgja við

Einans kr. 14.990,-
Avmarkað nøgd







SCALEO P4 2.0 GHz
- Intel Pentium 4 2.0 GHz
- 256 MB DDR-RAM
- 80 GB Harddisk
- GeForce4 64MB DDR TV-OUT
- DVD & CDRW
- AC97 Ljóðkort
- 120W Hátalarar
- 10/100 Netkort
- 56k Modem
- FireWire
- Tastatur & Wheel Mús
- 19" Monitor
- Nógv forrit og spøl fylgja við

Einans kr. 16.490,-
Avmarkað nøgd

OMEGA OMEGA OMEGA OMEGA

OMEGA TEL. 458676
TELDUR, TELDUÚTGERÐ OG TÆNASTA


# KARISMA skipar fyri ferð til Bergens við Atlantsflog

Um nóg stórur áhugi er, skipar KARISMA fyri ferð til Bergens.

Ferðin verður gjørd í samband við heyst-evnisskeið og ungdómsráðstevnu á Levende Ord

**Ferðaætlan úr Føroyum:**
Úr Vágum týskvøldið 15. oktober kl. 18.30.
Úr Bergen leygardagin 19. oktober kl. 18.30.

**Kostnaður báðar vegir 2.100,00 kr.**

Ferðaseðlar verða fyrst latnir teimum, sum tekna seg til evnisskeiðið ella ungdómsráðstevnuna. Um pláss er eftir, kunnu onnur áhugaði eisini koma við.

Skipað verður fyri gisting og flutningi hjá teimum, sum tekna seg til tiltøkini á Levende Ord.

**Kostnaður fyri gisting á gistihúsið 4 nætur: 1.000,00 kr.**

Eisini ber til hjá áhugaðum í Noregi at keypa ferðaseðlar til Føroya og aftur.

**Ferðaætlan úr Noregi:**
Úr Bergen týskvøldið 15. oktober kl. 21.30.
Úr Vágum leygardagin 19. oktober kl. 16.30.

**Kostnaður báðar vegir 2.100,00 kr.**

Bílegging og tilmeldan áðrenn 22. september á telefon 314088 - 214088 - 221499
e-mail: danjac@kallnet.fo

**KARISMA**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Útibarnagarðurin Spírin**

Í Spíranum ganga 20 børn í aldrinum 5-6 ár.

Barnagarðurin liggur væl fyri í barnavinarligum og náttúruríkum umhvørvi.

Dentur verður lagdur á at nýta mest møguliga tíð úti í náttúruni.

Árstíðirnar seta sjálvsagt sín dám á gerandisdagin, og hava tær ymiskar møguleikar og avbjóðingar við sær.

## Pedagogur

Tórshavnar kommuna søkir eftir pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna í útibarnagarðinum Spíranum.

**Starvið**
gevur tær møguleika at arbeiða í einum fjølbroyttum og øðrvísi umhvørvi í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur. Tú verður við til at gera gerandisdagin hjá børnunum stuttligan, mennandi og læruríkan.

Tú fært møguleika at seta tín persónliga dám á stovnin. Dentur verður lagdur á sjálvstøðugt arbeiði, har tú dugir at síggja møguleikar heldur enn forðingar.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. oktober 2002. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið. Um pedagogur ikki søkir starvið, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sigrun Davidsen, leiðara, á tlf. 228070, ella Katrina Petersen, samskipara, á tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Útibarnagarðinum Spíranum, c/o Føroya Ríðingafelag, Havnardalur, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 20. september 2002.